**Eilen Anthoniussen**
eilen@sosialurin.fo



GLAÐIR pensionistar

Komandi tíðina fer Sosialurin at varpa ljós á gerandisdagin hjá pensionistum í Føroyum. Glaðir pensionistar kring landið fara hvønn mikudag at greiða frá hendingum og upplivingum úr sínum lívi, og hvussu tað er at vera pensionistur í Føroyum.





# Julianna hevur bundið í

**Fyri stuttum fylti bindikonan í Havn, Julianna Didriksen, 80 ár. Hon hevur bundið síðan hon var 12 ára gomul, hon hevur skipað fyri óteljandi bingospølum og er harafturat óførur sjavsspælari. Fyri 17 árum síðan gavst hon at arbeiða, og fór í staðin at binda troyggjur fyri fólk. Og hon hevur ongantíð havt meir at gera enn nú**

GLAÐIR PENSIONISTAR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Her fyri helt Julianna Didriksen úr Havn sín 80 ára føðingardag. Hann varð hildin í Pálsstovu í Havn fyri 200 fólkum. Hóast sín høga aldur, hevur hon torført at binda frið. Er hon ikki upptikin av at binda troyggjur til føroyska konu- ella mannfólkabúnan, spælir hon sjavs, bakar ella setir seg handan róðrið í bili sínum og koyrir ein túr.

– Eg bant mína fyrstu troyggju sum 12 ára gomul. Eg minnist, at hon hevði ein so vakran borda á, sum eg bant eftir einum mynstri, eg hevði sæð í eini bók. Eg vaks upp hjá ommu míni, sum lærdi meg at binda, greiðir Julianna Didriksen frá.

Hon fekk eina harða byrjan upp á lívið á Strondum, har hon vaks upp. Mamman doyði stutt eftir at Julianna varð borin heim, og vaks hon tískil upp hjá ommuni. Hon giftist ung til Toftir, og var ikki meir enn 24 ára gomul, tá hon gjørdist einkja og harvið einligur forsyrgjari. Við fimm ára gomlu dóttrini Ásu, flutti Julianna síðan til Havnar at arbeiða.

- Eg byrjaði at arbeiða á RUBA, gamla reinsaríið í Havn. Har var eg verandi í trý ár, hóast tey ikki hildu meg klára nakað serligt - eg, sum vigaði minni enn 100 pund, sigur hon flennandi.

### Dreingirnir byrjanin til troyggjurnar

Julianna Didriksen leigaði í Havn um hetta mundi, og tað gekk ikki so long tíð til hon fann sær nýggjan mann. Tey bæði fingu seks dreingir í slag. Tá fekk hon hendurnar fullar, og treiv hon aftur í vakra handalagið, omman á Strondum hevði lært hana, og fór at binda børunum troyggjur.

– Tey høvdu øll somul føroysk klæðir. Tá gjørdi mann alt sjálvur.

Hon hevur myndir standandi av øllum sjey børnunum, øll somul í føroyskum klæðum.

– Býtt var eg at selja klæðini. Tað var soleiðis tað byrjaði, at eg fór at binda fyri fólk. Onkur vildi fegin keypa føroysk klæðir frá mær, og seldi eg klæðini hjá dreingjunum, sum vóru vorðin ov lítil. Fyri 100 krónur settið!

Ikki øll settini eru kortini farin so langt. Ikki longri enn so, enn at hon veit hvør hevur tað eina settið.

Inntøkan frá føroysku klæðunum var góð afturat tá. Men fyri at vinna meir pening, fór Julianna út at arbeiða um kvøldið, tá børnini og maðurin, sum var bakari, vóru farin í song. Tá fór hon oman í pylsuvognin á Vaglinum at arbeiða, og eitt skifti arbeiddi hon eisini á Tórs Kafeteria. Í 1977 skifti hon til fast arbeiði, tá hon fór á Landssjúkrahúsið at arbeiða sum gongsgenta.

– Á Landssjúkrahúsinum dámdi mær ótrúliga væl at vera, og har var eg verandi í góð 15 ár tilsamans.

### Krasjaði og forelskaði seg

Tað gekk ikki millum Julionnu og pápan at dreingjunum, og fóru tey frá hvørjum øðrum nøkur ár seinni.